gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Myndirnar hjá Generalstabunum á internetinum

**Matrikulstovan hevur lagt út á internetið gamlar myndir, sum vórðu tiknar í Føroyum í 1890'unum, tá men frá Generalstabens Afdeling máldu Føroyar upp**

GAMLAR MYNDIR
*Tíðindaskriv*

Í tíðarskeiðinum 1895 - 1899 vóru fólk frá Generalstabens topografiske Afdeling í Føroyum og gjørdu uppmátingar til kortlegging av oyggjunum.

Uppmátingarlið arbeiddu allastaðni í landinum undir leiðslu av »generalstabsofficerum«. Sjálvt arbeiðið gjørdu starvsfólk hjá Generalstabinum, sonevndir »Guidar« og vanligir soldátar. Eisini føroysk hjálparfólk tóku lut í arbeiðinum. Tá uppmált varð uppá tað mesta, arbeiddu íalt 14 uppmátingarlið í senn.

Úrslitið av uppmátingunum gjørdist 75 máliborðsbløð í støddini 1:20.000, sum komu út í tíðini 1897 - 1901. Sostatt eydnaðist at kortleggja hvønn krók í Føroyum eftir bert 6 árum, og má hetta sigast at vera eitt bragd.



*Amtmansborgin í Havn seinapartin í 1890'unum. Hon var bygd í 1880 - og her sæst, hvussu hon hevjar seg yvir býnum. Fremst í myndini sæst Kamarið, Pæsastovan skjøldurin í húsunum hjá Vágaheina í Bringsnargøtu*

Í 1985 fekk Føroya landsstýri handað umleið 265 myndir frá Geodætisk Institut, flestu tiknar í 1898 og 1899. Myndirnar, sum eru glasplátur í støddini 13 x 18 cm, eru í varðveitslu á Matrikulstovuni.

Matrikulstovan hevur nú skannað tær áhugaverdastu myndirnar og lagt tær á heimasíðuna hjá stovninum: www.matrikul.fo. Talan er um 143 myndir úr øllum

Føroyum. Serliga nógvar myndir eru úr hesum støðum: Tvøroyri, Sandur, Vestmanna, Saksun, Tórshavn, Eiði, Fuglafirði, Klaksvík og Viðareiði.

Á heimasíðuni hjá Matrikulstovuni finnur tú eisini annað tilfar. Nevnast kann:
- Kort og yvirlit yvir hagar í Føroyum.
- Yvirlit yvir tal av eigindómum og jarðarlutum í ymsu bygdunum.
- Ymisk føroyakort.
- Myndir av hægstu fjøllunum og størstu hólmunum.
- Spurnakapping um býir/bygdir.



*Hendan myndinr er tikin úr Krókabrekkuni niðan gjøgnum Bringsnargøtu í Havn. Høgrumegin síggjast Laðahúsini, vinstrumetin Handilsforeiningin, Áarstova, Dandastova, Pæsastova og Klokkarastova*



*Skipið Botnia við bryggju, helst í Keypmannahavn og helst á veg til Føroya. Leggið til merkis hestavognin, sum verður heysaður umborð…*



*Mynd tikin á Skálatoftum í 1890'unum*



*Mynd úr Klaksvík – eftir grindadráp*

# Flaggdagshald í Fuglafirði.

Fuglafjarðar Hornorkestur skipar fyri flaggdagshaldi í dag kl. 15 við Bókasavnið. Røðari verður Sjúrður Skaale.

Fuglafjarðar Hornorkestur er illa mannað í løtuni – 12 í tali. Men aktivitetirnir eru tó ikki færri av teirri orsøk. Teir føstu tættirnir gjøgnum árið, har vit luttaka, eru vanliga: Tá musikskúlin skipar fyri næmingakonsert, tá kvøldskúlin hevur framsýning, í desember ein jólakonsert umframt tey trý jólatrøini at tendra í kommununi. Og so eru tað tey afturvendandi føstu tiltøkini um vári: Grækarismessuhald, flaggdagshald, 1.mai-dagshald – og á Varmakeldustevnu. Í løtuni verður vant fram ímóti hornorkesturstevnuni, sum í ár verður suðuri á Tvøroyri Dýra Biðidag. Í tí sambandi verður skipað fyri eini konsert her í Fuglafjarðar kirkju 6. mai, har vit fáa roynt stevnuskránna.

Venjari hjá Fuglafjarðar Hornorkestri er Sharon Fisher, sum eisini er venjari hjá klaksvíkingum.

Til flaggdagshaldið luttaka skótarnir. Vit vóna, veðrið verður til vildar – og vænta góða undirtøku.

*Fuglafjarðar hornorkestur*

gult7 cyan7 magenta7 svart7



# Vegurin komin hálva leið

**Landsverkfrøðingurin er komin umleið hálva leið við gerðini av vegnum millum Gomlurætt og Norðasta Horn. Gamli vegurin verður nú ikki fylgdur víðari, tí veglinjan er nú broytt soleiðis, at vegurin verður lagdur eystanfyri ella innanfyri tjarnirnar á Hálsinum**

SAMFERÐSLA
*Stefan í Skorini*

Í einar tveir mánaðir hevur arbeiðið uppá nýggja landsvegin av Gomlurætt til høvuðsstaðin ligið stilt. Nú er líkt til, at arbeiðsmenn frá landsverkfrøðinginum fara undir at asfaltera ein hálva annan kilometra langan tein, ið er liðugur. Hetta er onnur etapa ella byggistig.

Alt arbeiðið uppá vegin verður boðið út til privat byggifeløg at gera. Annað byggistig eru nærum liðugt, og tað er felagið Heygar, ið hevur staðið fyri hesum arbeiðnum.

Finnleif Durhuus, deildarleiðari á vegadeildini hjá Landsverkfrøðinginum, væntar, at arbeiðið at asfaltera verður liðugt einaferð í summar. Enn er tó eingin dagfesting sett á, nær tað eftir ætlan verður liðugt.



*Arbeiðið uppá vegin millum Gomlurætt og høvuðsstaðin hevur ligið stilt í einar tveir mánaðir. Nú fer landsverkfrøðingurin í holt við at asfaltera henda teinin, og tað verður koyrandi einaferð í summar*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Veglinjan broytt

Frá byrjan av var ætlanin, at nýggi vegurin fyri tað mesta skuldi fylgja tí gamla vegnum. Eftir at hava mett um støðuna hevur landsverkfrøðingurin tikið avgerð um at leggja vegin innanfyri tjarnirnar.

Hetta er gjørt fyri at kunna varðveita umhvørvið og tað fríøkið, ið er framvið gamla vegnum vestanfyri tjarnirnar, har nógv fólk nýtir fríðtíðina um summarið. Tað hevði órógva, um ein stórur og breiður vegur varð lagdur ígjøgnum hetta økið.

Finnleif Durhuus sigur, at teir mettu tað vera best, um vegurin varð lagdur innanfyri tjarnirnar. Onkur hevur borið ótta um, at nógvur kavi fór at leggjast á vegin, um hann var ov nær hamrinum, men hesum vísir Finnleif Durhuus aftur.

Hann sigur, at teir við vilja hava lagt vegin høgt í lendinum, og tað ger, at kavin kann fúka omanav. Hetta verður tí eingin størri trupulleiki enn vanligt.

Bæði Friðingarnevndin og Yvirfriðingarnevndin hava góðtikið hesa broytingina, og vegurin verður sostatt lagdur innanfyri tjarnirnar.

## Byrja av Norðasta Horni

Landsverkfrøðingurin arbeiðir nú við projekteringini og fyrireikar útbjóðingartilfarið, sum skal vera klárt at senda byggifeløgum í ár. Væntandi verður klárt hjá tí byggifelagnum, sum bjóðaði bíligasta prísin, at fara í gongd seinni í ár.

Tað arbeiðið skal byrja á Norðasta Horni. Higartil hevur grót av Gomlurætt verið nýtt til vegagerðina, men har er einki eftir, og tí skal grót fáast úr grótbrotinum í Hundsarabotni. Tá grótið skal flytast úr Hundsarabotni, er tað léttari at byrja uppá vegin á Norðasta Horni, so sleppast kann undan at nógv tung ferðsla koyrir eftir tí gamla vegnum.

# Tryggingarfelagið Føroyar 52 milliónir í yvirskoti

**Úrslitið hjá størra útbjóðaranum av tryggingum í Føroyum, Tryggingarfelagnum Føroyar, gjørdist frægari í fjør enn í 1999. Rakstrarúrslitið eftir skatt var 52,3 milliónir krónur ímóti 45,8 milliónum árið fyri, men tryggingarvirksemið gav undirskot**

ROKNSKAPUR
*Stefan í Skorini*

Hóast eitt fitt yvirskot, er leiðslan í tryggingarfelagnum ikki nøgd við, at høvuðsvirksemi felagsins gevur eitt hall. Úrslitið av tryggingarvirkseminum var eitt undirskot uppá 16,6 milliónir móti 17,4 milliónum í 1999. Hóast eina framgongd uppá 5%, er tað framvegis ikki nøktandi.

– Vit kunnu sum felag ikki vera nøgt við, at høvuðsvirksemi okkara ikki gevur vinning, sigur felagið í tíðindaskrivi.

Framgongdin í samlaða rakstrarúrslitinum eftir at skattur var goldin, var 14,3%. Yvirskotið var 45,8 milliónir í 1999, meðan tað var 52,3 milliónir í fjør.



*Tryggingarfelagið Føroyar hevði í fjør eitt yvirskot uppá 52,3 milliónir krónur, men høvuðsvirksemi felagsins, tryggingar, gav eitt hall*

## Fleiri skaðar

Orsøkin til undirskotið í tryggingarvirkseminum er, at felagið hevur havt fleiri skaðar, ið hava verið størri enn vanligt. Harafturat eru prísirnir fyri tryggingar lækkaðir vegna fríu kappingina.

Virksemið í landinum er stórt, og tað merkir ein øking í talinum av skaðum, ið tryggingarfelagið skal gjalda fyri.

Felagið nevnir tveir skaðar, sum kostaðu serliga nógv. Tað var tá Halgafelli stoytti á land í Noregi og sakk í januar 2000. Hin var tá Com Data í Klaksvík brendi nakað seinni. Hesir báðir skaðarnir kostaðu felagnum nógv, og hava sín stóra leiklut í, at tryggingarvirksemið gav eitt hall í fjør.

## Íløguaktiv lunnar undir yvirskoti

Aftur í 2000 vóru tað fíggjarinntøkur felagsins, ið løgdu lunnar undir úrslitið. Úrslitið av íløguaktivum var 80,4 milliónir krónur móti 65,3 milliónum í 1999. Høvuðsorsøkin til framgongdina er, at gongdin á alheims fíggjarmarknaðinum førdi til ein kursvinning uppá ognir felagsins í 2000 móti einum kurstapi í 1999.

Íløguaktivini hjá Tryggingarfelagnum Føroyar eru í alt 1,3 milliardir krónur. Av hesum vóru við árslok 2000 66 mió. í bygningum, 21,7 mió. í kapitalpørtum, 64 mió. í børsskrásettum partabrøvum. Tann størsti parturin, 819,1 mió. vóru sett í børsskrásett lánsbrøv, 244,1 mió. vóru læntar út í Føroyum, mest til kommunur og kommunalar og almennar stovnar. 142,8 mió. av íløguaktivum felagsins standa sum innlán í peningastovnum.

Úrslitið áðrenn skatt var eitt avlop uppá 61,8 milliónir. 9,5 milliónir av hesum vórðu goldnar í skatti, so at rakstrarúrslitið var 52,3 milliónir krónur. Eginognin var við árslok 1,17 milliardir krónur, og solvensurin var 34 ferðir lógarkravið.